

Soleiðis brúki eg mínar
## PENGAR

**Eilen Anthoniussen**
eilen@sosialurin.fo



**– BRILLURNAR HAVI EG KEYPT FYRI 30 KRÓNUR ONKUNSTAÐNI**

*– Eg eri nokkso nørdut, tá tað kemur til tøkniliga útgerð. Eg keypti mína fyrstu teldu í 1983. Tað hugtók meg, at teldan kundi so nógv, hóast tað er lítið aftur ímóti í dag.*

**ELIN HEINESEN** hevur eitt tvíbýtt lív á nógvar mátar. Bæði við húsarhaldi og lívsstíli. Av tí at familjan er sundurbýtt, er hon noydd at gjalda tvær húsaleigur - bæði í Stoffalág og í Keypmannahavn. Tað er ikki bíligt, ásannar hon, og hevur við sær, at eyga skal haldast við kontuni. Men tøknimótanum fylgir hon, og hevur hon havt teldu síðan 1983. Samstundis er góði temunnurin við sukur og mjólk fastur partur av gerandisdegnum

**Myndir:** Jens Kr. Vang jensk@sosialurin.fo

Stjórin á SamViti, Elin Heinesen, er 50 ára gomul og støk. Eftir nógv ár í Keypmannahavn, flutti hon fyri tveimum árum síðan til Føroya, tá hon tók við starvinum sum stjóri í SamViti.

– Mítt húsarhald er kanska eitt sindur serligt. Ætlanin var, at dóttirin skuldi flyta upp til mín, tá hon gjørdist liðug við skúlaárið tað summarið, tá eg flutti til Føroya um várið. Men so forelskaði hon seg upp um bæði oyru, og flutti tí ikki við. Hon býr tí enn í Keypmannahavn, og eg eri flutt inn í barndómsheimið hjá mær í Stoffalág. Pápi hennara, sum eisini býr í Keypmannahavn, hevði ikki møguleika at lata hana flyta inn, har hann býr. Tí gjaldi eg í veruleikanum tvær húsaleigur. Tað kostar sjálvandi, og so er so mikið minni eftir, sigur hon.

Elin Heinesen ger ikki nógv mat – annað enn tá hon fær gestir. Á arbeiðsplássinum hava tey eina matarskipan, sum passar henni væl, og tí verður ikki nógvur matur gjørdur heima við hús.

– Eg tími illa at gera mat bara til mín sjálvs. Ikki tí, eg havi hillar fullar av matbókum. Tá eg var yngri, elskaði eg at royna meg fram, men sum árini ganga, finnur mann so nøkunlunda út av, hvat riggar. Tað kemur kortini fyri at eg stilli meg at eksperimentera eitt sindur.

Stjórin í SamVit arbeiðir nógv. Umleið 60 tímar um vikuna, um hon skal meta um. Hóast lítla tíð til matgerð, leggur hon seg eftir at eta sunt.

– Eg eti lítið kjøt. Eg havi innrættað meg eitt sindur eftir dóttrini, sum leingi hevur verið vegetar. Eg havi funnið út av, at eg kenni meg frískari uttan kjøt. Kortini eri eg ikki fanatisk. Eg kann gott eta fugl og fisk, til dømis, men so at siga ongantíð svínakjøt, sigur Elin Heinesen.

**– EG TÍMI ILLA AT GERA MAT BARA TIL MÍN SJÁLVS. IKKI TÍ, EG HAVI HILLAR FULLAR AV MATBÓKUM.**

### VISTFRØÐILIGT EIN JAVNVIGAN MILLUM PRÍS OG SAMVITSKU

Føroyski maturin hevur høga raðfesting hjá Elin Heinesen.

– Serliga ræstan fisk og ræst kjøt. Einki er betri enn tað. Tað luktar bara so illa, so tað stendur ikki ofta á matskránni, flennir hon.

Hon kann kortini gott finna uppá at gera ræstan fisk bert til sín sjálvs. Tá stendur eymhettan for frá, og vindeyguni uppá víðan vegg.

Heima hevur hon eina stóra frystiboks, sum hon fyllir í. Men hon kann eisini gott eta tað sama í fleiri dagar, tá hon hevur gjørt nógvan døgurða.



Elin fyritrekkir tær vistfrøðiligu vørurnar, og roynir at vera tilvitað um at keypa vistfrøðiligt.

– Men tað er ein javnvigan millum prís og samvitsku, ásannar hon.

– Eg vildi ynskt, at vistfrøðiligu vørurnar vóru bíligari, og oftari uppá tilboð. Tað er umráðandi, at brúkarar eru tilvitaðir um, hvat teir keypa, haldi eg. Er eftirspurningur eftir eini vøru, so skal tað nokk loysa seg at selja tað. Á tann hátt kann brúkarin vera við til at gera sítt til, at matvøruídnaðurin gerst umhvørvisvinarligari, sigur Elin Heinesen.

Einum gomlum vana hevur hon síðan barndómin hildið fast við. Tað er temunnurin uppá tann enska mátan, sum omman lærdi hana at virðismeta.

– Ein klassiskan temunn við mjólk og sukur. Tað gangi eg og drekki allan dagin.

### EINKI MERKIDÝR

Elin Heinesen hevur eina bakgrund sum blaðstjóri á einum donskum kvinnublað. Hvønn mánaða varð nýggj mynd tikin av henni, og umvegis stylistar og ekspertar, ið starvaðust á blaðnum, fekk hon nógv ókeypis ráð um, hvat riggar og ikki.

– Men nakað merkidýr eri eg ikki. Eg keypi rættiliga sjáldan klæðir, men eg fái sovorðin herindi, har eg blívi ordiliga troytt av tí, eg havi, so tá eg endiliga keypi nakað, keypi eg nógv. Fyri fleiri túsund krónur í senn, um ráðini eru til tað. Annars havi eg ofta hugsað, at eg og vinkonurnar burdu gjørt, sum vit ofta gjørdu í Danmark, tá vit allar høvdu ein posa av klæðum við, sum vit ikki brúktu. Og so býttu vit bara um klæðir. Tað er ein bíligur máti at skifta alla garderobuna.

Tá Elin Heinesen fer á klædnajakt, hyggur hon ikki eftir merki ella prísi, men um tað passar og situr pent. Alt innkeyp verður kortini gjørt, alt eftir hvat er í pengakassanum.

– Eg eri ikki góð til at spara upp, men eg klári at balansera. Eg eri lítið materialistisk, men mær dámar væl at hava tað hugnaligt rundan um meg.